FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Almannamálaráðið**

Tórshavn 1. november 2022

**Hoyringssvar til uppskot til leiðbeining um viðgerð av klagum hjá javnstøðunevndini**

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tann 4. oktober 2022 fingið "*Uppskot til Leiðbeining um viðgerð av klagum hjá javnstøðunevndini*" til hoyringar. Felagið hevur hesar viðmerkingar til uppskotið.
Fyrst fegnast vit um, at ein leiðbeining verður gjørd, har reglur fyri málsviðgerð hjá Javnstøðunevndini verða nágreinaðar. Hetta taka vit sjálvsagt undir við.

**Viðmerking til punkt 3.2.**
Punkt 3.2. í leiðbeiningini sigur, "*Tá heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann Javnstøðunevndin víkja frá kravinum um skrivliga klagu.*"
Mælt verður til, at greitt verður nærri frá, hvat "*heilt serligar umstøður*" er. Gott hevði verið við dømi, sum lýsir heilt serligar umstøður. Eitt nú hvør er munurin á "*serligum umstøðum*" og "*heilt serligum umstøðum*"?

**Viðmerking til punkt 4.2.**
Punkt 4.2. sigur, at "*Skrivstovan kann eisini seta seg í samband við klagara, um klagan má nágreinast, ella um upplýsingar vanta*".
Her mæla vit til, at sama er galdandi fyri klagaða, soleiðis at ein klaguviðgerð hevur somu treytir fyri báðar partar í málinum. Endamálið við málsviðgerðini er at tryggja, at málið er nóg væl upplýst til nevndina at taka støðu. Tí ber til, at avgerðandi upplýsingar vanta frá einum parti í málinum, klagaða eins væl og klagara, sum kunnu ávirka málsviðgerðina og avgerðina hjá Javnstøðunevndini. Tað er sera óheppið.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag
Jórun Gardar

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo